## Tvífløgan Kaggin – sangur og skemt




8. novembur eru 40 ár liðin, síðan Kaggin var stovnaður. Í tí sambandi er komin út fløgan *Kaggin-sangur og skemt*, sum er tilfar frá ársveitslum Kaggans 1979, 1980, 1981 og 1984. Á fløguni eru tveir og ein hálvur tími við góðum sangi og skemti. Kann vera, at onkur ikki kennist við alt, sum sipað verður til, men limir í Kagganum og tey, ið høvdu samband við umhvørvið, munnu kenna broddin og tónan í skemtinum aftur. Útgávan gevur lurtaranum høvi til at uppliva veitsluhýrin í Kagganum hesi árini. Tilfarið á fløguni er m.a. songur og felagssongur. Vit hoyra t.d. Hermann syngja góðar tættir um hendingar og persónar, sum høvdu tilknýti til umhvørvið. Hermann syngur eisini góðu vísuna um Petur Kúll. Hermann leikar ofta sjálvur á klaver, men eisini leikar Svenn Brimheim á gittar á upptøkunum. Robert McBirnie hermir eisini væl eftir Hermanni í sanginum "Til Havnar vit fara", ein skuldi næstan trúð, at tað var Hermann, sum sang. Láturin rungar, tá ið Bóka-Niels (Niels Nielsen) lesur upp úr gerðabók Kaggans, og Leivur á Skála hevur eitt innslag um "4 minuttir". Hermann hevur nakrar hugleiðingar um kaggalimir og hendingar í Kagganum, serliga eru postkortini hjá Bambusi til Kaggans ógvuliga stuttlig. Robert McBirnie hermir eisini eftir suðuroyingum, m.ø. Hjørleivi Enni og Johan Djurhuus. Tað er forlagið Glint, sum hevur givið út tvífløguna. Finn Jørgensen hevur tikið upp. Finnur Hansen hevur ljóðreinsað. Sára Finsdóttir hevur sniðgivið. Eilif Brimheim og Tórður Johannesarson hava lagt til rættis.

# Kend sjónvarps-kvinna vitjar

**Danska sjónvarps-kvinnan Line Baun Danielsen heldur vikuskiftið í Føroyum. Hon skal vera gestur í sending hjá Rás2**

VITJAN
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Line Baun Danielsen telist millum tey kendu andlitini í donskum sjónvarpi. Í 20 ár hevur hon starvast sum journalistur og vertur í sjónvarpsendingum, og hon hevur fleiri ferðir vunnið virðislønir fyri sítt arbeiði.

Seinastu tíðina hevur hon arbeitt sum miðlaráðgevi og hevur eisini havt fyrilestrar, har hon hevur greitt fólki frá, hvussu tey kunnu avrika tað besta hvønn dag.

Fyri tveimum vikum síðani gav hon nýggja bók út, har hon hevur tosað við tríggjar kendar kvinnur um at vera mamma. Hon ger upp við hugtakið, at kvinnur skulu stremba eftir at verða heimsins besta mamma.

Eisini hevur Line Baun Danielsen verið við í populeru sendirøðini Vild Med Dans, sum TV2 sendir í hesum døgum.

### Vitjar í Føroyum

Leygarkvøldið verður Line Baun Danielsen gestur í sendingini Hvonn Live, sum Rás2 sendir beinleiðis av Hvonn í Havn.

Har verður tosað um at verða á toppinum í gerandisdegnum, um at verða mamma og stríðast við ringa samvitsku, og tosað verður eisini um at vera almennur persónur við tí góða og minni góða, sum fylgir við tí.

Hvonn Live verður sent leygarkvøldið frá klokkan 20.00 av Hvonn í Havn. Fólk eru vælkomin á Hvonn at lurta, og annars ber sjálvsagt til at lurta eftir Rás2.



*Line Baun Danielsen verður leygarkvøldið gestur í sendingini Hvonn Live, sum Rás2 sendir*

## Skjótari tráðleyst breiðband

**Føroya Tele bjóðar nú 3G+, sum er tráðleyst breiðband við háferð. 3G+ gevur bæði betri góðsku og hægri ferðir á tráðleysa internetinum til bæði fartelefon og teldu**

SAMSKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Eftir drúgvar kanningar av møguleikunum fyri at betra um tráðleysa breiðbandið, skrivaði Føroya Tele í vár undir avtalu við svensku fyritøkuna Ericsson um at seta upp eitt nýtt og framkomið breiðbandsnet í Føroyum. Úrslitið av hesum samstarvi er, at Føroya Tele í dag kann lata føroyingum 3G+, ið er grundað á mest framkomnu tøknina innan tráðleyst breiðband og fartelefoni.

- Aftan á útbyggingina hevur Føroya Tele brúkt drúgva tíð upp á at testa netið soleiðis, at hetta lýkur góðskukrøv okkara, og at kundarnir harvið fáa eina dygdarupplivingu, sigur Jan Mortensen, stjóri á FT Samskifti.

Hann sigur eisini, at nýggja netið hjá Føroya Tele stuðlar nú undir ferðir upp til 21 Mbps. Ferðin á haldunum er tó sett varliga, fyri at brúkarin fær lovaðu ferðina.

Í Havn, Klaksvík, á Skálafjørðinum og á flogvøllinum ber nú til at nýta 3G+ netið hjá Føroya Tele, og við hesum hava 55% av føroyingum møguleika fyri 3G+, umframt tey, ið ferðast yvir flogvøllin.

Tá ið netið verður liðugt útbygt, fevnir tað um meginpartin av bygdum landøki og føroyskum sjóøki.

- Hetta er við til at staðfesta okkara støðu sum fremsti veitari av samskiftistænastum í Føroyum, og vit eru sera fegin um at kunna bjóða kundum okkara hesar nýggju møguleikar, sigur Jan Mortensen, stjóri á FT Samskifti.

Fyri brúkaran merkir hetta, at ljóðgóðskan á telefonsamrøðum verður enn betri. Eisini verður tað væl skjótari at nýta internetið á fartelduni og fartelefonini.

Fyri at gera tað lætt og einfalt at nýta internet á fartelefonini, hevur Føroya Tele gjørt ein nýggjan fartelefonportal, ið er at finna á flags.fo. Har ber til at lesa tíðindi, síggja veðurtíðindi, fara á facebook, kanna vevmyndir og flogferðslu, fyri bert at nevna nøkur dømi. Eisini ber nú til hjá øllum kundum, sum hava hald frá Føroya Tele, at fáa teldupost umvegis fartelefon.

- Hetta er fyrsta stigið í okkara 3G+ ætlan, og nú vit hava fingið eina góða byrjan, eru vit farin undir stig tvey. Ætlanin er at útbyggja, so vit dekka føroyskt sjóøki, samstundis sum dekningurin á landi verður víðkaður. Harafturat ætla vit at koma við nýggjum tænastum, sum gagnnýta nýggja netið, sigur Jan Mortensen um víðari ætlanina við 3G+.